# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Margretha Egholm 103 ár

Sunnudagin 28. mai 2006 fylti Margretha Egholm á Lágargarði í Havn 103 ár.

Hóast høga aldurin er Margretha hampuliga væl fyri og kundi hugna sær saman við gestunum á føðingardegnum.

Margretha er ættað úr Miðvági. Foreldrini vóru: Henrietta, f. Joensen, við Kirkjar, og Jóannes Niclasen, í Skálalonini, bæði úr Miðvági. Hon var nr. 5 av 11 systkjum.

Margretha fór sum ung til Hvalbiar at tæna í bóndagarðinum í Stórstovuni, seinni kom hon til Havnar at tæna. Hon fór eisini á húsarhaldsskúlan „Haraldsborg“ í Roskilde.

Í 1928 giftist hon við Petur Egholm (1898-1954) úr Havn. Tey búðu í J.C. Svabosgøtu, við síðuna av gamla Sjómansskúlanum, og í mong ár búðu sjómanskúlanæmingar hjá teimum. Tey høvdu t.d. neyt uppi við Kongaminni, og Margretha gekk hvønn dag niðan har at mjólka.

Margretha og Petur fingu sonin Jens Petur, sum eisini býr í Havn.

Fyri átta árum síðan flutti Margretha á Lágargarð at búgva.



†

## Andlát og jarðarferðir

**Heini Sigfred Jacobsen**, ættaður úr **Klaksvík**, búsitandi í Hirtshals, andaðist leygardagin 27. mai, 55 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Malvinus Joensen**, vanliga nevndur **Malvinus í Brekkuni**, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi sunnudagin, 77 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Hans Kristian Mikkelsen, Tórshavn**, andaðist á Landssjúrkshúsinum sunnudagin 28. mai, 58 ára gamal. Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 17. Jarðaferðin verður úr Ebenzeer mikudagin kl. 13.

Kistan við **Fridu Sólheyg** fer úr kapellinum heim í Christianskirkjuna týsdagin 30. mai kl. 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni mikudagin 31. mai kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini

## Torfinn Johansen til minnis

* 11/8-56 ✝ 27/5-05



27. mai 2005 andaðist Torfinn Johansen brádliga einans 48 ára gamal í Danmark, har hann starvaðist sum timburmaður.

Torfinn leikaði við MB øll 70'ini og langt upp í 80'ini. Øll, sum minnast tað "gamla" liðið hjá MB, sum spældi seg upp í 1. deild í 1977, minnast eisini henda fima miðvallarleikaran, sum hevði eina formidabla bóltføring, ein, ið altíð hugdi upp, áðrenn hann spældi bóltin, altíð vakin og klárur at gera sítt besta.

Tað, ið sermerkti Torfinn, var hansara lítillætni á vøllinum, ið gjørdi hann ómissandi fyri áleyparar sum Sámal, Harry, Árna, Jón Eirik og aðrar, sum altíð fingu bóltarnar aftur frá Torfinni.

Torfinn var tann perfekti bandaleikarin, allir, sum leika fótbólt vita, hvussu týdningarmikið tað er at hava ein góðan bandaleikara.

Tá Torfinn gavst at leika fótbólt, fór hann til Danmarkar, har hann ímillum annað starvaðist sum timburmaður.

Torfinn hevði so nógvar ymiskar eginleikar, hann gekk á ymiskum skúlum, har hann nam sær kunnleika til síni ítriv, ið vóru gittarspæl og tekning.

Tað tók hart uppá Torfinn at missa fyrst pápan og síðan, nøkur ár seinni, mammuna av hesi heviligu sjúku, ið rakar so mong. Men stutt áðrenn hann andaðist, var hann eydnusamur fyri fyrstu ferð í nógv ár.

Hóast Torfinn hevði búð í Danmark í nógv ár, vitjaði hann fleiri ferðir um árið aftur til Miðvágs og ongantíð gloymdi hann MB.

Nú, tá ið MB aftur stóð á egnum beinum fyri fyrstu ferð í 11 ár, var eingin so glaður sum Torfinn, sum veitti MB sín fasta stuðul øll árini.

Vit í MB fara ongantíð at gloyma teg, Torfinn.

**Miðvágs Bóltfelag**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi og verfaðir okkara

**Hans Kristian Mikkelsen**

Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 28. mai, 58 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer mikudagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Arnhild, Mariann, Katrin og Silja**

Tey, ið ynskja at minnast Hans Kristian við blómum, kunnu ístaðin lata eina gávu til Kristnastovu. Konta í peningastovnunum.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hans Petur Olsen**
Skála

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til sangarar, gravarar og øllum, sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri kransar, blómur og peningagávur til Sambýli fyri Autistar undir Gráasteini 4.
Hjartans tøkk øll somul.

*Vegna tey avvarðandi*
**Kona,**
**børn, svigarbørn, abbabørn og langabbabørn**

Alment hátíðarhald

Í sambandi við at 3. byggistig av Eysturoyar Røktar- og ellisheimi er komið undir land, verður skipað fyri **almennum** hátíðarhaldi á heiminum

týsdagin 30. mai 2006 kl. 15.00-18.00

*Øll eru hjartaliga vælkomin*

Eysturoyar Røktar-og ellisheim
620 Runavík

